# Gjaldførið negativt

**Í nýggjastu hagtølunum hjá Lands-bankanum sæst, at gjaldføri landskassans er farið niður um markið fyri minsta innláni hjá landskassanum**

GJALDFØRI
*Edvard Joensen*

Gjaldførið hjá landskassanum er negativt í løtuni. Tað liggur, sambært seinastu hagtølunum hjá Landsbankanum, sjey milliónir undir tí marki, sum ásett er fyri at vera minsta innlán hjá landskassanum í Landsbankanum.

Ásett er, at minsta innlánið hjá landskassanum skal vera 15 prosent av bruttotjóðarúrtøkuni. Tað er í løtuni 1.500 milliónir. Men so nógvar pengar eigur landskassin ikki í Landsbankanum í løtuni. Har standa 1.493 milliónir.



*Landsstýrismaðurin við fíggjarmálum umsitir í løtuni ein landskassa við negativum gjaldføri*

Men tað er kortini ikki nakað, sum fær landsstýrismannin við fíggjarmálum at missa svøvnin. Bárður Nielsen segði soleiðis við Sosialin í januar:

»Eitt minstamark fyri innláni í Landsbankanum er sett til at vera 15 prosent av BTÚ, bruttotjóðarúrtøkuni. Men hetta er bara vegleiðandi, sigur Bárður Nielsen. Tað hendir eingin vanlukka, um farið verður eitt sindur niður um tað talið.

– Tað er ikki fyrr enn vit koma 30 prosent undir tað talið, sum svarar til tey 15 prosentini, at tað verður kritiskt, sigur landsstýrismaðurin.

Nettostøða landskassans var í december 2004 1.517 milliónir krónur, og minsta inngjald landskassans í Landsbankanum skuldi vera 1.485 milliónir. So har var ikki so nógv at geva av.

Fyri januar í ár skal minsta innlánið vera 1.500 milliónir, sigur Bárður Nielsen. Tað er tí, at framrokningar vísa, at BTÚ hækkar í mun til 2004, sigur hann.«

Men hann náddi ikki teirri hálvariaðru milliard í januar. Har mangladu sjey milliónir í. Kortini ætlar landsstýrismaðurin ikki at broyta tey ásettu 15 prosentini, um farast skal eftir tí, hann segði við Sosialin í januar:

»Tað er óseriøst at hugsa so. Lógin er gjørd fyri at verða hildin. Tað er ikki so, at vit skulu gera lógir eftir tí, sum vit klára at liva upp til, sigur hann.«

# Nýggjur stýrisformaður

**Elfelagið SEV hevur fingið nýggjan stýrisformann. Tað er Leivur Hansen, býráðslimur í Havn, sum tekur við eftir Poul Arna Jacobsen úr Sørvági**

SEV STÝRI
*Edvard Joensen*

Tað lýsir fyri Býráðnum í Havn. Formaðurin í SEV stýrinum er nú at finna millum býraðslimirnar í Havn. Hann eitur Leivur Hansen.

Leivur Hansen, býráðslimur í Havn hevur tikið við leiðsluni í SEV stýrinum eftir Poul Arna Jacobsen úr Sørvági, sum hevur verið formaður seinastu 12 árini. Næstformaður í SEV stýrinum gjørdist Súni í Hjøllum av Toftum. Hetta hendi á fundi fríggjadagin, tá stýrið fyri elfelagið skipaði seg.

Teir eru báðir nývaldir í stýrið. Suni í Hjøllum er valdur fyri Jóannes Thomsen í Fuglafirði, umboðandi Eysturoynna.

Leivur Hansen varð valdur í SEV stýrið í staðin fyri Bjarta Mohr, býráðslim í Havn. Og tað valið spældi ikki stillisliga av. Tað endaði við brævskrivan og fjølmiðlaviðgerð, tí minnilutin í býráðnum helt ikki, at alt var farið fram, sum tað átti. Men makt er makt, og meirilutin vann. Og nú situr umboð teirra á ovasta tindinum í SEV stýrinum.

Tríggir av sjey stýrislimum hjá SEV eru nývaldir. Umframt formannin og næstformannin, er eisini Kim Olsen í Hósvík nývaldur í stýrið at umboða Norðurstreymoy í staðin fyri Marjuna Olsen í Vestmanna.

Hinir fýra stýrislimirnir, sum vórðu afturvaldir, eru Kristian Fríðrik Olsen fyri Norðoyggjar, Poul Arne Jacobsen fyri Vágar, Tórur Johannesen fyri Sandoy, Skúvoy og Dímun, og Dia Poulsen, sum umboðar Suðuroy.



*Leivur Hansen varð fyrst valdur í SEV-stýrið fyri Bjarta Mohr, og síðan valdur til stýrisformann*

Mynd: Jens Kristian Vang

Eisini umboðsnevndin hjá SEV skipaði seg á fundi fríggjadagin. Har var útskiftingin í toppinum tó ikki so stór sum í stýrinum, hóast næstformaðurin varð nývaldur.

Hans Tausen Olsen úr Runavík varð afturvaldur til umboðsnevndarformann hjá SEV. Nýggi næstformaðurin er úr Klaksvík og eitur Sigurd Syderbø.



*Poul Arne Jacobsen - nr. tvey frá høgru - varð ikki afturvaldur eftir at hava sitið sum formaður í SEV stýrinum tey seinastu 12 árini*

Mynd: Jens Kristian Vang

## Lægri lønargjaldingar

**Nýggjastu hagtølini hjá Landskassanum vísa, at lønargjaldingarnar í januar í ár eru lægri enn í januar í fjør**

LØNIR

Hóast samlaða útgjaldsupphæddin bert er eina millión lægri í januar í ár, enn hon var í januar í fjør, er ein reel lækkan at síggja, tá sáttmálabundnar hækkingar verða tiknar við.

Lønarútgjaldingarnar í útflutningsvinnuni vóru í á 21 milliónir lægri, enn tær vóru í januar i fjør.67 milliónir í ár móti 88 milliónum í fjør.

Ein av orsøkunum er ivaleyst tað vánaliga veðurlagið, sum hevur forða útróðrinum rættiliga nógv í januar.

Hinvegin eru útgjaldingarnar hjá innanlands vinnunum øktar við 20 milliónum, sum so mestum vigar upp í móti teirri minking, útflutningsvinnurnar hava verið fyri.

Útgjaldið í januar í ár er upp á 369 milliónir í móti 349 milliónum í fjør. Hendan økiningi upp á 20 milliónir svarar til 5,7 prosent. Í hesari hækking liggur so eisini sáttmálabundin lønarhækking.

Samanlagt verður munurin so minus eina millión krónur í januar í ár í mun til januar í fjør.

**ej**